# HOFF STOFF



- Skal eg eisini hava hesa blómuna?, tykist Mary siga. Hon var eins fegin fyri allar blómurnar hon fekk, og hvørt einasta barn merkti veruliga tann livandi áhugan hon hevði í hvørjum einstøkum teirra

## Føroyskt design í gávu

Hoff Stoff
*Snorri Brend*

**Miðvágur:** - Nú eru tit komin til seinastu etapuna av víðu ferð tykkara í Føroyum. Vit vóna, at tit hava notið vitjanina, segði Napoleon Magnussen, borgarstjóri í Miðvági, tá tey kongaligu vóru komin til borðs í skúlanum í bygdini.

Undir skúlan stóð Ungdómskórið í Vágum, undir leiðslu av Alis Simonsen og sang fleiri kend gospelløg fyri teimum kongaligu. Eftir eina strævna ferð í oynni, har tey høvdu verið í øllum bygdunum, var nú seinasta samkoman á skránni – ein góður biti, saman við umboðum fyri allar bygdirnar í oynni.

Á hesi samkomuni fingu tey kongaligu hjúnini handaðar fleiri gávur – m.a. eina bókagávu við trimum bókum, sum lýsa ávís evni innan føroyska mentan: Bókina um listamannin Trónd Patursson, eina bók um føroyska bátin og eina við upptekningum av føroyskum vísum.

Mary og Fríðrik fingu eisini hvør sína serstøku gávu – føroyskt framleiddar jakkar, sum designarin Malan Helgadóttir hevði latið úr hondum.

Hon nýtti eisini høvið at greiða frá arbeiði sínum. Og á tíðindafundinum seinni um dagin var júst føroyskur móti og føroyskt design nakað av tí, sum tey kongaligu fegnaðust um, og sum tey sóu ríkar møguleikar í fyri Føroyar í framtíðini.

Eftir døgverðan í Miðvági var seinasti steðgurin á Hotel Vágum, har tíðindafólk fingu høvið at spyrja tey kongaligu ein hóp av spurningum.



*Henda konan, Asleyg er helst millum tey allarmest kongatrúgvu føroyingarnar. Tá drotningahjúnini vitjaðu Ellisheimið í Vágum fekk hon høvið at heilsa uppá Heinrik, og mín sann um hann ikki gav henni ein koss*



## Spent Eva

*Eva var øgiliga spent eftir at sleppa at hitta drotningina. Hon skuldi geva henni eitt blómutyssi*

Hoff Stoff
*Snorri Brend*

**Sandavágur:** Tað var ikki nógv um lítlu Evu, sum hevur sína dagligu gongd í barnagarðinum Sóljugarður fyrrapartin henda hósmorgunin.
Tað var ikki lætt at fáa orð á hana, tí hon konsentreraði seg bara um tað eina: Hvussu skal eg geva blómutyssið til Margrethu drotning.
Sum ein part av vitjan síni í Føroyum var avgjørt, at tey drotningahjúnini skuldu leggja leiðina inn í henda nýggja barnagarðin í Sandavági.
- Eg eri ógvuliga spent, var einasta orðið, vit fingu úr hesi sjey ára gomlu Evu Christiansen, sum í dagens anledning var ílatin føroysk klæði.
Tá so drotningin umsíðir kom í Sóljugarðin handaði hon henni blómurnar, uttan at ótti sást av nøkrum slagi. Óført.

